## DAGSINS MEINING

# Ein gloymdur bólkur

Herfyri var spurningurin um bústaðar- og viðgerðarviðurskifti hjá teimum sálarliga sjuka umrøddur í Sjónvarpi Føroya. Talan var um sendingina Gesturin, har ein maður, ið arbeiðir innan økið, tók fram fleiri sera viðkomandi og álvarsamar spurningar. Skal ein stutt samanfatað niðurstøða av samrøðuni gerast, so má tíverri staðfestast, at vit í Føroyskum eru langt aftan fyri Norðurlond, tá talan er um psykiatri sum heild. Hetta er galdandi fyri lóggávuna, viðgerðina og fyri bústaðarviðurskiftini. Tað tykist, sum at vit eru tey einastu í Norðurlondum, sum framvegis hospitalisera pyskiatriskar sjúklingar. Hesir sjúklingar búgva í alt ov stóran mun á sjúkrahúsi. Hetta er spell og áttu myndugleikarnir at gjørt nógv meira fyri at útvega hesum fólkum bústað úti í samfelagnum.

Annað, sum gekk fram av sendingini, er, at vit í Føroyum liva undir einari lóg um psykisk sjúk frá trýatiárinum, meðan ein eitt nú í Danmark hevur fingið nýggja lóggávu, ið verður endurskoðað við føstum millumbilum. Í øðrum londum verður nógv gjørt til tess at tryggja rættindini hjá sjúklingunum, soleiðis at teir fáa eina mannsømiliga tilveru. Her hjá okkum tykist tó alt stranda uppá trótandi játtan. Tað eru heilt einfalt ikki pengar til tess at gera nakað álvarsamt við hendan spurningin. Hetta er tíverri heildarmyndin fyri alt heilsuverkið, og støðan bara versnar!

Í somu sending fingu vit eisini at vita, at fleiri álit eru skrivað, men einki hendir. Eingin politiskur vilji er at seta tilmælini í verk. Vit fingu ikki at vita, hví so er, men vit loyva okkum at gita, at fíggjarligu umstøðurnar eru ikki til tess. Tað er ikki politiskur vilji at játta pening til hendan samfelagsbólk. Hetta er mikið spell. Tað er ikki minni spell, at lóggávan um viðgerð av sálarsjúkum ikki verður dagførd. Hetta snýr seg ikki bert um viðgerð men um grundleggjandi sjúklingarættindi, ið eisini eru mannarættindi. Her má vend koma í, tí vit kunnu ikki í einum vælferðarsamfelagið venda ávísum bólkum bakið.

At enda skal vera sagt, at sendingin var bæði hugvekjandi og sera viðkomandi, og maðurin, ið greiddi frá tók fram nøkur viðurskifti, ið myndugleikarnir ikki soleiðis uttan víðari bara kunnu lata fara aftur við borðinum. Tað skal vera okkara vón, at tað nú av álvara verður gjørt nakað við spurningin um psykiatriina í Føroyum. Vit kunnu ikki bíða longur. Til sjónvarpið: tøkk fyri at tit fáa slík viðurskifti fram í ljósið. Hetta er eisini eitt mál fyri miðlarnar sum heild at taka upp, og tá vit nú eru við sjónvarpið, so er hetta eisini evni, sum hevði hóskað seg væl til frálíku sendingina Breddin, sum mánakvøldið eisini á áhugaverdan hátt viðgjørdi spurningin um útlendingar í Føroyum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Spurningar til Høgna Hoydal

**Schandorff Vang**



Nú er væl fráliðið síðan vit hoyrdu nakað um yvirtøkuna av politinum, tí kundi eg hugsað mær alment svar upp á nakrar spurningar hesum viðvíkjandi.

Hvussu gongur við arbeiðnum í yvirtøkunevndini?

Kann Høgni Hoydal vátta, at arbeiðið gongur sera seint, og at tað veruliga eru trupulleikar, sum eru orsøkin?

Um eingir trupulleikar eru, hví gongur tað so seint við at fáa nakað meiri at vita?

Um trupulleikar eru, kunnu vit fáa hesar trupulleikar lýstar gjøllari?

Er tað nakað í tí, at føroysku embætismenninir veruliga hava ásannað, at yvirtøkan er nógvar ferðir meiri umfatandi enn teir høvdu droymt um?

Er tað so, at embætismenninir hava ásannað, at tað ikki ber til at skilja politi og ákærumynduleika sundur, men heldur hava valt at kanna møguleikarnar við somu skipan, sum vit hava í dag?

Hvussu nógv hevur kanningin kostað skattaborgaranum higartil?

Nú hava vit eisini hoyrt um uttanríkisnevndina, sum skal mannast við føroyskum og donsku embætismonnum.

Høgni Hoydal sigur, at vit eiga at gera arbeiðssetningin.

Vil tað siga, at sami yvirtøkuruðuleiki skal valda í hesi nevnd, sum í nevndini, sum er sett at kanna yvirtøkuna av politinum?

# Tøkk fyri, Jørgen Niclasen og Jóanis Nielsen

**Vága valdømis fólkafloksfelag**

Hjartaliga takka vit tær, Jørgen, fyri tíðina, tú á so virðiligan og dugnaligan hátt røkti starvið sum landsstýrismaður, til nú samgongufelagar og sokallaðir vinir sviku teg.

Samstundis takka vit tær, Jóanis, fyri tíðina, tú fyrimyndarliga hevur røkt starvið sum løgtingsmaður. Vit eru errin av tykkum og ynskja tykkum blíða og bjarta framtíð.

# Til Jóhan Hendrik

Í Sosialinum nr. 11 tann 17. januar í ár hevði undirritaði eina frásøgn frá hátíðarløtuni, tá Mentanarvirðisløn Landsins og Heiðursgáva Landsins vórðu handaðar. Í hesum sambandi skrivaði eg, at Jóhan Hendrik Winther Poulsen í røðu sínari til Axel Tórgarð nýtti "høvið at siga sína hugsan um mentunar- og miðlapolitikkin í dag á hesum stovni (ÚF), sum, hann segði, var dottin niður á langlegg". Sama dag skrivar Dimmalætting um røðuna hjá Jóhan Hendrikki: "Tá Axel Tórgarð ikki longur var har (í ÚF), datt innihaldið á hesum stovninum niður á langlegg, sum hann málbar tað".

Hvørki av bløðunum hevur endurgivið røðaran rætt. Jóhan Hendrik segði einki um mentunar- ella miðlapolitikk Útvarpsins í røðuni, men meinti bert við teljingarlagið, sum ofta var at hoyra fyri umleið 40 árum síðani, og sum nú sambært røðaranum var dottið av tjóleggi niður á langlegg.

Eg vóni, at Jóhan Hendrik fyrigevur mær mistakið.

**Theodor E. D. Olsen, blaðmaður**

# "Færøsk Politik" fyri hundrað árum síðani

**100 ÁR**

*Norrønafelagið í Føroyum*



Í ár eru liðin hundrað ár, síðani bókin "Færøsk Politik. Nogle Uddrag og Betragtninger" eftir Jóannes Patursson kom út. Bókin gjørdist tá í 1903 hugsjónarliga grundarlagið hjá føroyska sjálvstýrispolitikkinum.

Jóannes Patursson legði dent á, at sínámillum fatan, sum kann føra til sínámillum samstarv, er bara gjørlig, byggir hon á sínámillum vitan.

Norrøna Felagið í Føroyum heldur tað vera vert at gera vart við, at í ár eru liðin hundrað ár, síðani "Færøsk Politik" kom út.

Mikudagin tann 22. januar kl. 19.30 heldur Jákup Thorsteinsson, søgufrøðingur, almennan fyrilestur um bókina "Færøsk Politik" á Landsbókasavninum í Havn. Har verður eisini høvi at síggja bókina.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Sjónleikur aftur í Fuglafirði

**UMMÆLI**

*Signar á Brúnni*



So bragdaði aftur á sjónleikaraøkinum í Fuglafirði. Heili tjúgu ár eru liðin síðani Fuglafjarðar Sjónleikarafelag framførdi sjónleik seinast, so tað var við stórum spenningi fólk leitaðu í Mentanarhúsið leygarkvøldið 18. januar at hyggja at íslendska skemtileikinum Fiskar á turrum landi, ið Árni Ibsen ættaður av Stykkishólmi hevði skrivað, og sum Turið Sigurðardóttir hevði týtt.

Karmarnir í nýggja stásiliga mentanarhúsinum eru fram úr góðir, so møguleikarnir hjá sjónleikarunum at framføra ein góðan leik skuldu verið góðir.

Leikstjóri var Magni Poulsen undir Gøtueiði, ið man teljat millum frægu sjónleikararnar í landinum. Hann hevði fingið væl burturúr, tey fýra ungfólkini, ið leiktu, komu øll væl frá sínum leikluti.

Kennet Jørgensen, ið leikti Knútur, ið var maður í tríati aldur, sum ongar framtíðarætlanir hevði, kom væl frá hesi uppgávu. Hann tosaði týðuliga og hart, dugdi at spæla við og verða upptikin av tí, ið aðrir leikarar á pallinum bóru fram.

Hann dugdi eisini við sínum andlitsbrøgdum – uttan at gera ov nógv av – at lýsa hvørjari støðu hann var í. Hann fekk mangan allar áskoðararnar at sita í skellilátri.

Áslakkur Nesá , ið leikti ungur handilsmaður úr Reykjavík við stórum framtíðarætlanum - mótvegis Knúti – kom eisini væl frá sínum leiki. Hansara leikur var ikki so lættur at spæla og kravdi nógv av persóninum. Frá at vera tann blíði handilsmaðurin, skuldi hann aðrar tíðir verða illur fyri ikki at siga óður. Og aftur aðrar tíðir var hann drukkin. Men alt hetta megnaði Áslakkur til fulnar.

Hanna Lassaberg , leikti at vera kona Gudmund, dugdi somuleiðis sín leiklut væl og virðiliga.Hon dugdi at spæla tann heldur tápuliga konan, ið tráaði eftir øðrum mannfólki m.o. Knúti, helst tí, at maður hennara Gudmundur, hevði bert eitt í kvittanum, og tað var at vinna pening uppá stytst møguliga tíð.Hon dugdi væl at spæla kvinnan, ið ikki hevði alt ov nógv innanfyri, eins og hon kom serliga væl frá tí partinum, tá ið hon hevði fingið hug á tí lítillætna Knúti, ið Kennet spældi.Sera skemtiligt og væl spælt.

Marita Øre, leikti spákona, ið var nakað heilt fyri seg. Marita hevði valt at tosa uppá ein serligan máta, sum onkur helt fyri, var serliga fuglafjarðaligt. Marita megnaði hetta allan leikin og kom hon eisini væl frá sínum leikluti.

Var nakað at fílast á, so var tað, at leikararnir í einstøkum førum tosaðu ov spakuliga, so tey , ið sótu aftarlaga ikki fingu alt við. Men havandi í huga, at leikararnir eru nýggir, og hava lítlar so royndir ,so má sigast, at tey komu øll væl frá leikinum.

Turið Sigurdardóttir hevði týtt leikin.Tað er ikki lætt at umseta úr einum máli í annað, ikki minst tá talan er um skemtileikir, tí teir skemtingarsomu setningarnir, skulu helst verða eins skemtingarsamir í tí umsetta, sum í tí upprunaliga. Hesum er Turið komin væl frá.Málbúnin var lættur og náttúrligur. Og tó, okkurt var, ið kundi verið øðrvísi t.d. tá ið Knútur sigur: Eg havi ikki "sagt eitt kis". Vit plaga at siga, at vit "hoyrdu ikki Kis" og ikki "sagt eitt kis".( sagt eitt orð)

Orðið "keðsamt" varð nýtt, ístaðin fyri tað mest nýtta orðið í vanligari talu "keðiligt".Orðini "hvat sker" varð nýtt ístaðin fyri " hvat hendir", ið somuleiðis verður nýtt í vanligari talu. Sjónleikaravirksemið er byrjað aftur í Fuglafirði .Byrjanin varð góð, og eftir tí , ið frættist, so hevur Magni Poulsen, leikstjóri, ætlanir um at fara undir ein størri og meira krevjandi leik í næstum, sum vit kunnu gleða okkum til.

# Støðið á Ung í Føroyum hækkað

**TÍÐINDASKRIV**

Tá freistin var úti 15. november vóru ikki færri enn 110 tilmeldingar komnar inn til Ung í Føroyum 2003, sum verður nú um mánaðarskiftið januar/februar, og meira enn tveir triðingar av hesum meldaðu seg til sðna eitthvørt listarligt avrik fram, antin myndlist ella á palli.

### Ungdómsmentan

60 føroysk ung millum 13 og 18 ár sleppa við á Ung í Føroyum 2003, sum er ein ungdómsmentanarstevna, ið Norðurlandahúsið skipar fyri frá 31. januar til 2. februar. Tey 60 útvaldu sleppa hetta vikuskiftið at arbeiða í listaverksmiðjum leiddar av yrkislistarfólkum. Tey hava øll egin listarlig avrik at sðna fyri hinum ungu á stevnuni fyrsta kvøldið eftir at stevnan er sett. Verksmiðjur verða í myndlist, tónleiki, kór, skriving, video og dansi.

Annlis Bjarkhamar, mentamálaráðharri, ið eisini er verndari fyri UíF 2003, setur stevnuna.

### Endamálið

Høvuðsendamálið hjá UíF er at varpa ljós á ungdómsmentanina í Føroyum og at skapa umstøður til tey ungu at sýna fram og menna tað listarliga virksemi, tey hava áhuga fyri. Á hendan hátt verður miðað í móti at styrkja samspælið millum egnan virkisanda og kunnleika og at fáa innlit í skapandi ungdómsmentanini, sum hon er í dag. Tí byrjar stevnan við egnum sýningum, tey ungu áseta sjálvi tema fyri verksmiðjurnar og tað er uppgávan hjá verksmiðjuleiðarunum at stuðla, heldur enn at stðra ungdómunum.

### Almenn sýning

Sunnudagin 2. februar kl. 17 fær almenningurin høvi at síggja úrslitið av einum intensum vikuskiftið, har arbeitt hevur verið frá árla til síðla í hvørjum króki av Norðurlandahúsinum. Her verða bæði pallframførslur og listaframsðning við úrslitinum av tí, verksmiðjurnar hava avrikað hesar dagarnar.

Atgongumerkjasølan til hesa sýning byrjar nú í Norðurlandahúsinum og Kunningarstovuni.

## VIÐMERKINGAR

# Vallalíð á breddan aftur

**Jógvan Arge, Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin**



Tað er bert samgongan í Tórshavnar Býráð, sum hevur viðgjørt byggimálið í Vallalíð av nýggjum. Vit í minnilutanum eru ikki sloppin uppi í viðgerðina.

Tað í sjálvum sær er ódámligt, tá vit nú hóast alt hava eitt býráð, sum eftir demokratiskari siðvenju er sett saman av bæði meiriluta og minniluta.

Umboðanin í teimum ymsu býráðsnevndunum er er fyri ein part ætlað sum trygd fyri, at minnilutin ikki verður hildin burtur frá borðinum, har málini verða viðgjørd.

Tann mannagongdin, sum nú borgarstjórin nú brúkar, rýkur langan veg av illvilja móti øðrvísi hugsandi.

Herfyri bað eg um at fáa málið um Vallalíð fyri í byggi- og býarskipanarnevndini. Eg fekk tað ikki á sjálva dagsskránna, men eftir fleiri sýtingar frá nevndarformanninum eydnaðist at fáa eina kunning.

Tað er tað einasta, minnilutin veit um málið.

Tekniska deild og borgarstjórin greiddu eftir hart trýst frá mótmælinum frá grannunum, og borgarstjórin segði, at hann var farin at kanna møguleikarnar fyri at fáa eina loysn saman við grannunum.

Tað, sum síðani er hent, stendur alt fyri meirilutans rokning. Meirilutin hevur einsamallur tikið avgerð í málinum á serligum samgongufundi seinasta fríggjakvøld.

Síðani hevur samgongan samtykt at lækka bygningin í Vallalíð hálvan annan metur, men grannarnir siga, at hetta hjálpir hvørki frá ella til.

Samstundis hevur borgarstjórin ásannað, at kommunan hevur ikki borið seg heilt rætt at, og at hon hevur gjørt fyrisitingarlig mistøk.

Av tí, at hetta málið einans verður viðgjørt í skýmaskotum meirilutans, fari eg at biðja um at fáa tað sett á skrá á almenna býráðafundinum, sum verður hósdagin tann 30. januar.

Har vænti eg at fáa eina gjølla frágreiðing um øll viðurskifti í málinum, og at sjálvt býráðið fær høvi til at viðgera og atkvøða um tær avgerðir, sum fyrisitingin og samgongan hava tikið.

Skuldi tað óhugsandi hent, at borgarstjórin sýtir fyri at taka málið á dagsskrá í býráðnum, fari eg í øðrum lagi at biðja um at fáa málið fyri í byggi- og býarskipanarnevndini á fyrsta regluliga fundi, sum verður vikuna eftir býráðsfundin.

Kravið verður sett fram, tí eg haldi, at tað er ein vanvirðing av borgarum og býráðslimum, at borgarstjórin tekur alla viðgerðina og avgerðina í einum slíkum álvarsmáli inn í samgonguna, sum ongan formligan avgerðarrætt hevur.

At enda tveir spurningar í øllum ruðulleikanum:

1) Hevur samgongan einsamøll saman við fyrisitingini heimild til at broyta reglurnar fyri bygging við Vallalíð?

2) Hvør játtar pengarnar til tað eykaarbeiði, sum kommunan nú hevur átikið sær at gera. Hava samgongan og fyrisitingin heimild til tað einsamallar?